DAGSINS MEINING

Ein dáragerð

Árliga sirkussið hjá Strandfaraskipum Landsins er byrjað. Avloysaraskip her og avloysaraskip har. Avloysaraskip, sum annaðhvørt ikki kunnu brúkast, ella sum fólkið annaðhvørt ikki vil hava. Eitt ár var tað Claymore, sum suðuroyingar umdoyptu til No-more. Í ár er tað eitt skip, sum kallast Scania.

Nú tá skipið skuldi fara at sigla um Suðuroyarfjørð, kann skipið ikki brúkast til farmaflutning. Einki er í dekkinum, sum farmurin, trailarar og lastbilar, kunnu surrasr í! Áttu Strandfaraskip Landsins ikki at havt funnið út av hesum, áðrenn skipið varð leigað?

Men alt botnar í einum heilt tilvildarligum samferðslupolitikki. Vit kunnu kanska ikki lasta tað seinasta, men meiri tað næstseinasta landsstýrið fyri hesa tilvildina. Tá høvdu vit eitt frálíkt skip, Teistan, sum varð brúktur til suðuroyarsigling og sum avloysaraskip saman við Smyrli, sum varð brúktur til uttanlandssigling.

Men landsstýrismaðurin, sum tá sat, hevði ikki nakað gott eygað til Skotlandssiglingina. Skipið varð selt av landinum. Ikki fyri ta stóru upphæddina, men einar 13 mió.kr. Við at selja Teistan tók Føroya Landsstýri av ein góðan flutningsveg hjá føroysku útflutningsvinnuni og ein góðan ferðamøguleika hjá tí vanliga føroyinginum.

Hetta var ein dáragerð, sum vit framvegis merkja á hvørjum ári! Um eini tvey ár fáa vit ein nýggjan og stásiligan Smyril. Hann siglir skjótt. Ferðaætlanin fer at hava aðrar og neyvari tíðir og vinna og fólk verða vand við heilt aðrar umstøður!

Hvør skal loysa hann av, tá hann skal til eftirlit - Claymore, Scania ella Dúgvan? Ella skulu vit hava verandi Smyril tøkan sum avloysaraskip til Suðuroyarsiglingina ella Leirvíksfjarðaleiðina? Livst so spyrst!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Jóannes Eidesgaard fekk ein beint ímillum eyguni

Abraham Mikladal

Aftan á valið í 1998 peikaði Jóannes Eidesgaard, og harvið Javnaðarflokkurin, á Høgna Hoydal, sum samráðingarleiðara. Táið so Anfinn Kalsberg, og ikki Høgni Hoydal, fekk initiativið og skipaði samgongu uttan um Javnaðarflokkin, breiddi frustratiónin og hevndarhugurin seg í Javnaðarflokkinum, serliga hjá Jóannesi.

Frá at ynskja eina fullveldiskós eftir tí íslendska háttinum, saðlaði Jóannes um og bleiv meira og meira sambandssinaður. Í dag hava Jóannes og Javnaðarflokkurin yvirhálað Sambandsflokkin í høgru síðu, táið um fullveldisspurningin ræður.

Men hvat fekk Jóannes og Javnaðarflokkurin burtur úr hesi opportunismu og hevndarferð. Hvat fingu tey burturúr øllum tí gori og galli,ið er goyst út um alt Føroya land í samfull 4 ár. Tosið um krystallnætir, teknningarnar hjá Óla P o.a. Hugsa bara um tann sveittandi, hástóra og gronuta formannin, sum mest líkist einum, ið er kliptur burturúr eini mynd av balkongini á maousulenum á Reyða Torginum í Moskva.

Jú, Jóannes og Javnaðarflokkurin fingu ein beint ímillum eyguni. Teir fingu stórtap.

Jóannes og Javnaðarflokkurin, ið sitið hevur í andstøðu, hevur havt lyklastøðu á Fólkatingi og hevur sítt egna málgagn, ið kemur út 5 ferðir um vikuna, átti at vaksið við fleiri tingfólkum.

Men Jóannes misti 199 persónligar atkvøður (-28%) og Javnaðarflokkurin gekk aftur við 1,06 %, og kláraði ákkurat at varveita sína tingmanning.

Eg skilji væl at Jóannes brúkar orðið frustratión sum 3. hvørt orð tá hann tosar.

Ps. Sum skilst hevur Jóannes, undir samgongusamráðingunum, kravt at gerast løgmaður. Hvussu kann ein stórtapari ditta sær tað?

Innliman ella útliman

Helgi Abrahamsen

Sosialurin hevði mikudagin eina samrøða við løgmann, sum varð endurgivin fyri at siga, at um Sambandsflokkurin brádliga vildi ganga við til at yvirtaka eina rúgvu av málsøkjum og ikki setti krav um innliman í danska ríkið, so var realistiskt at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin kundu arbeiða saman.

Hóast eg kenni væl Sambandsflokkin, so havi eg ongantíð enn sæð nakað ynski ella krav frá flokkinum um nakað sum kann kallast innliman í danska ríkið.

Fyri Sambandsflokkinum er eingin ivi um, at Føroyar eru longu limur í danska ríkinum, og tí vildi tað verið heilt burturvið av flokkinum at komið við kravi um innliman í eitt ríki, har vit longu eru limir.

Líka so undarligt er tað, at løgmaður sum leiðari fyri fullveldissamgonguni, er bangin fyri, at Sambandsflokkurin fer at krevja innliman í sama ríki, sum samgonguflokkarnir stríðast við at sleppa úr.

Eg fari tí at spyrja løgmann hesar spurningar:

Spurningur 1: Hvørji úttalilsi frá Sambandsflokkinum kunnu tulkast sum eitt krav, um innliman í danska ríkið?

Spurningur 2: Nær hevur Sambandsflokkurin sett nakað tílíkt krav fram?

Berjabrekka aftur á borðið

Jógvan Arge,
býráðslimur

Undirritaði hevur biðið um, at byggiætlanin hjá Sp/f Høgna Mikkelsen á Berjabrekku kemur til viðgerðar á fyrsta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð.

Havi víst til ta umroðu, sum hetta mál hevur fingið í fjølmiðlunum seinastu dagarnar, og til áheitan frá Eigarafelagnum Undir Brúnni á býráðið um fund við byggi- og býarskipanarnevndina um málið.

Ein spurningur, sum er reistur, er, hvar markið er fyri stykkið, sum kommunan hevur latið Sp/f Høgna Mikkelsen at byggja íbúðir á. Ætlanin tykist vera at byggja soleiðis, at eitt gott spælipláss hjá einum barnagarði verður týnt.

Ein annar spurningur, sum er reistur, er, hvussu høgt tað ber til at byggja í hesum umráðnum omanfyri núverandi húsini á Berjabrekku.

Havi samstundis biðið um, at byggi- og býarskipanarnevndin fær høvi til at kunna seg um, hvar mørkini eru fyri tað stykkið, sum latið er Sjálvsognarstovninum, sum kommunan er partur í, at byggja íbúðir á í sama grannalag.

Havi skilt, at fólk, sum búgva á Berjabrekku, halda, at hetta stykkið, sum er einar 9000 fermetrar, eftir støðuplaninum kemur inn á øki, sum tey brúka í dag sum veg og parkeringsplass.

Taki fult undir við, at vit mugu hava greiðu á, hvat bæði vinstra hond og høgra hond gera í býráðnum í hesum spurningi.

Mær er játtað, at málini koma fyri á nevndarfundi 3. juni.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Tann breiða samgongan hjá Fólkaflokkinum...

Áki Andreasen

Síðan valið 30. apríl, munnu samgonguætlanirnar helst hava tað evnið, sum hevur verið mest umrøtt millum manna, fjølmiðlarnir hava verið á staðnum og eftir førimuni roynt at kunnað Føroya fólk um, hvat gongur fyri seg í ymisku flokshølunum á Gamla Apoteki.

"Sitandi" samgonga

Tá samráðingarmøguleikarnir læstu seg fastar, eftir at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir saman í bólk, bleiv greitt, at sitandi samgonga skuldi halda fram - við 16 tinglimum aftan fyri seg. Hetta var kjakevni í fimmaranum og var á hvørjari forsíðu. Atfinningarnar vóru nógvar - men tannleysar - sum so mangan, tá Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin standa fyri teimum. Men sum tímarnir og daganir gingu, so loystist andstøðublokkurin upp, og samráðingarnar millum "sitandi" samgongu og Javnaðarflokkin byrjaðu. Fólk vóru spent, mátti Javnaðarflokkurin nú koma "heim aftur" og verða við at reka ein politikk sum hesir flokkar so mangan høvdu gjørt áður?

Eftir samráðingar í 3-4 døgn slitnaðu, fólk hildu aftur ondini og vóru spent eftir, hvat nú henda skuldi; hvussu mátti "sitandi" samgonga fara at telva seg burtur úr hesum?

So komu boðini frá Anfinn Kallsbeg - løgmanni við teimum 16 tingliminum aftanfyri seg (herav 8 frá Tjóðveldisflokkinum); at Sambandsflokkurin bleiv innkallaðu og Tjóðveldisflokkurin settur uttanfyri - løgmaður, sum hevði samráðingarintiativið m.a við avgerandi játtan frá Tjóðveldisflokkinum, fór í samgongusamráðingar við Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Bæði løgmaður og Jóannes Eidesgaard løgdu dent á, at hetta vóru ikki samráðingar - men bara prát, kunning - kaffimunnar og hvat veit eg; tí teir vistu, at hetta var undir alt politiskt og moralskt lágmark. Fólkaflokkurin og Anfinn Kallsberg vita fullvæl, at hetta var tann fúlasta politiska revakakan, sum nakrantíð er malin av føroyskum politikarum, og tí ráddi um ikki at kalla tað samráðingar.

Løgmaður veit eisini, at misti hann stuðilin frá Tjóðveldisflokkinum, hevði hann ein meiriluta móti sær - men at nýta henda stuðulin at royna samgongu við Sambandsflokkin - og halda Tjóðveldisflokkin uttanfyri - tað kemur ikki undir politikst snildni ella politiska telving - men nakað heilt annað sum eg ikki skal koma inn á her. Men har bleiv so ikki semja - í fyrstu atløgu - men sum tað hevur ljóða bæði frá Jóannes Eidesgaard, Óla Breckmann og Lisbeth Petersen, so var eingin ósemja - tað var eitt yvamál um tað nakrantíð var slitnað - tað ráddi um at fáa "teir smáu steinarnar úr skónum…." Sum Óli Breckmann málbar seg, og hann fekk stuðul frá formanni Sambandsflokksins, sum longu segði seg vera farin í "renniskógvarnar", burtur sæð frá at politiski leikvøllurin í Føroyum nú er vorin ein skógvahandil, so er ikki gott at vita, hvat spyrst burtur úr

Fólkaflokkurin í stórum trupulleikum

At fólkaflokkurin er tvískinningur í tjóðskaparspurninginum er helst gingið upp fyri hvørjum mansbarni í Føroyum. Tinglimir floksins og løgmaður hava av øllum alvi roynt at dult hetta - men teppið er farið frá, og leikurin er blivin almennur!!!

Tjóðveldisflokkurin fekk skuldina fyri líkt og ólíkt í farna valskeiði, bara so at innanhýsis ósemjurnar í Fólkaflokkinum ikki skuldi gerast sjónligar.

Men nú ber ikki til longur - og fríggjadagin fyri Hvítusunnu mátti flokkurin á innanhýsis fund har greiða skuldi fáast á støðuni - so er bert at vóna at sambandsmennirnir í flokkinum hava lisi uppá - sína egnu stevnuskrá, tað skuldi ikki verið neyðugt, tá hugsað verður um, at Óli Breckmann hevur umboðað flokkin so leingi - men ilt er at siga, hvat kann gerast neyðugt.

Hvat so Djurholm og Niclasen hava fyri neyðini er ikki gott at vita.

Ein seinasta royndi hjá Fólkaflokkinum at dylja innanhýsys klandrið var at lata UF koma við tíðindum um, at kemur Miðflokkurin inn í myndina so fer Sjálvstýrisflokkurin út - men hetta var so avsannað av Kára P. Højgaard í somu tíðindasending, so bólturin beliv gúppaður aftur til Fólkaflokkin - sum vónandi ikki ger fleiri politisk sjálvmál.

Hvat feilar Tjóðveldisflokkinum…..???

Tá samráðingarnar slitnaðu - fekk Tjóðveldisflokkurin sjálvandi svartaper, og var lagdur undir at ikki at vilja semju og hava lítlan áhuga fyri samgongu. Men eg vil beinanvegin minna bæði Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin á, at eingin flokkur á Føroya Løgtingi strekti seg so langt, sum Tjóðveldisflokkurin alt seinasta valskeið!!!

Eisini til hesar samráðingarnar strekti Tjóðveldisflokkurin seg til semjur - men treytin má verða at okkurt so verður latið aftur fyri - men tá er sjálvandi ongin áhugi og Tjóðveldisflokkurin bleiv settur uttanfyri.

Í Sosialinum 18. mai er stór samrøða við tingmannin hjá Sjálvstýrisflokkinum undir heitinum "Tjóðveldið lítlan áhuga fyri samgongu". Her verður róð fram undir, at Tjóðveldisflokkurin kravdi ov nógv, og at Sjálvstýrisflokkurin má hugsa um framtíðina. Álvaratos er tað at krevja ov nógv at løgreglan og rættarmál verða yvirtikin innan fýra ár eru farin? Eitt drúgt fyrireikingaarbeiði er longu fingið frá hondini - og samráðingar við danskar myndugleikar skuldi byrja fyri valið - men blivu blokerað, tá Andres Fogh beinleiðis legði seg út í valstríðið, alt tað arbeiðið er farið í gongd - skal tað bara steðga og leggjast burtur, tað er beinleiðis at aka á afturpartinum og enntá aftureftir!

Kári P. Højgaard nevnir í samrøðini at 13 mál vóru í semjupottinum - men hann veit betur enn hann letst - hann er fullgreiður yvir hvat tað er fyri mál og hvat vavi tey hava!!!! Og endaliga so vil eg gera Kára P. Højgaard greitt at tíbetur er Tjóðveldisflokkurin so frægt at sær komin at hann slítur eina samráðing tá politikkur floksins ikki longur er umboðaður í teimum málum sum semjast kann um - tað er ikki júst tað sum tit í Sjálvstýrisflokkinum hava tradisjón fyri!!!

So Tjóðveldisflokkurin er áhugaður fyri samgongu - men eftir sum frælsi býr í hjørtum okkara er mark fyri hvat Tjóðveldisflokkurin kann liva við.

17. maðurin

Tað hevur bara verið tosað um ein breiða samgongu - tí týdningamikil mál skulu avgreiðast - fyri fýra árum síðan var eitt tað týdningamesta málið sett á dagsskránna, nevnliga fullveldið - tá taldi samgongumeirilutin 18…

Løgmaður hevur verið lítið áhugaður fyri at tosa um eina 17 manna samgongu, og tað er helst ikki uttan grund - trupulleikin er ikki Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin ella Miðflokkurin - nei trupulleikin er Fólkaflokkurin. At hava t. d Óla Breckmann sum tann 17. mannin kann kosta ov nógv fyri flokkin, og tað veit løgmaður - og so enda vit aftur í tí sannroynd at Fólkaflokkurin máa fáa innanhýsis klandri uppá pláss - og tað nyttar einki at spæla boltin til hinar flokkarnar og geva almenninginum varhugan av, at tað er har trupulleikin er. Er Fólkaflokkurin heilur og stendur við sína stevnuskrá - er eingin forðing fyri einari 17 manna samgongu, sum er fult arbeiðsfør.

Neyðugt skuldi sjálvandi ikki verið at endurtikið valorðini hjá Fólkaflokkinum um "at sjálvstýrismálið er lagt í eina trygga legu" - við løgtingssamtyktini um Sjálvstýri Føroya Fólks!!!!!!!!

Javnsettar samráðingar

Abraham Mikladal

Hesið seinastu 4 árini hevur Javnaðarflokkurin við Jóannes Eidesgaard á odda háða og niðurgjørt ynskið hjá samgonguni um javnsettar samráðingar við Danmark.

Og ikki nóg mikið við tí, Jóannes hevur gjørt alt, ið staðið hevur í hansara makt, fyri at skapa so ólíka samráðingar millum Føroyar og Danmark sum gjørligt. Jóannes sat jú við trumfinum sum tungan á váðskálini í donskum politikki, men ynskti ikki at nýta henda møguleika til at skapa javnsettar samráðingar.

Síðani valið 30. apríl hevur Jóannes Eidesgaard jamrað og meylað um javnsettar samráðingar. Hann hevur arbeitt bæði árla og síðla við at skipa alliansur o.a. fyri at náa kravinum um javnsettar samráðingar.

Og Jóannes Eidesgaard fekk javnsettar samráðingar. Verðandi samgonga lovaði honum til samráðingarborðið har eitt blankt ark lá. Eingi fyrivarni, eingin háðan og niðurgeðing av mótpartinum.

Tað má sigast at munur er á hvør ið virðir fólkaræði meir, Jóannes Eidesgaard og Javnaðarflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin saman við verðandi samgongu.

3. partur: Havnin og politiska nalvaskoðanin!

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Vit havnarmenn/kvinnur eiga lívið í øllum í Norðoyggjum, í Eysturoynni, í Norðurstreymoy, í Vágoy, í Sandoy og í Suðuroy, tá vit geva tykkum lívsmøguleikar.

Tað kann ikki vera rætt, at Havnin/Suðurstreymoy framhaldandi skal vera barnagenta hjá øllum heimstaðarkommunum úti í áðurnevndu útjaðaraoyggjunum.

Tað hevði verið gott, um havnarmenn/kvinnur tóku eitt annað skinn um bak og vístu øllum avbygdar/-býarfólki/fremmandafólki hvør ræður í miðstaðarøkinum!

Vit skulu finnast harðliga at arbeiðsgevarum/arbeiðstakarum í Tórshavnar kommunu hvat ein sjálvur ger í túsundtals lesarabrøvum í føroysku bløðunum.

Tað er tá, at hesir fara uttan um ALS & Almannastovuskipanir eftir arbeiðsmegi í heimstaðar kommunum og uttanlands tá tøk arbeiðsmegi er í Havnini.

Vit skulu ikki góðtaka at hesi fáa framíhjárættindi til teir lívsmøguleikar, ið eru í Havnini/Suðurstreymoy, ið leggur fótin fyri nýggjum havnarborgarum.

Tað kann sparast nógv innan samferðslukervi, Bygdaleiðir, Strandfaraskip Landsins, Farmaleiðir, við at fáa lokalar farstøðir úti í heimstaðarkommunum.

Vit havnarmenn/kvinnur skulu sannføra øll avbygdar/-býarfólk um, at tey tóku lívsgrundarlagi undan heimstaðarkommunum í kreppu árunum, sum vit upplivdu.

Avbygdar/-býarfólk eru tit góð við heimstaðarkommunurnar, flyta tit øll úr Havnini/Suðurstreymoy sum skjótast, tí tá fáa vit loyst okkara trupulleikar.

Tað hevði verið upp á tíðina at fingið gongd á bygdar-/økismenning, sum ein hevur nevnt í lesarabrøvunum: »Havnin og politiska nalvaskoðanin« í blaðnum.

Avbygdar-/býarfólk tit skapa heimastaðarkommunum í dag trupulleikar við øktari stagnatión.